# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi einki ímóti foreldrunum hjá Madeleine McCann, men tey eiga at fara aftur til Bretlands nú*

*(portugisiskur hotellstjóri)*

# Miðevropa stendur undir í vatni



*Her í Roche stúrdu myndugleikarnir fyri, at vatnið skuldi taka fleiri hús av grundini, og tí vórðu fólk flutt burtur*

**Óvanliga nógv regn hevur elvt til stórar trupulleikar í Sveis og Suðurtýsklandi**

Í fleiri bygdum og býum nærhendis Basel í Sveis sluppu fólk ikki út fyri dyr. Í bygdini Roche fór áin Eau Froide langt upp um áarbakkarnar, og tá myndugleikarnir bóru ótta fyri, at vatnið skuldi taka summi hús av grundini, vórðu umleið 80 fólk flutt burtur haðani.

Á Basel-leiðini og aðrastaðni í Sveis legði tað nógva vatnið at kalla alt samferðslukervið lamið, og myndugleikarnir noyddust eisini at steðga skipaferðsluni á Rhinen-ánni, tí skip sluppu ikki inn undir brúgvarnar í Basel.

Týsku megin markið var støðan lítið mætari, og í Baden-Württenberg hava áirnar sjáldan verið so stórar sum nú hesa tíðina á árinum.

- Tað er heilt óvanligt, at tað regnar so illa her hesa ársins tíð, sigur týski veðurfrøðingurin Andreas Wagner við tíðindastovuna DPA.

Tað eru ikki bara Sveis og Týskland, sum eru plágað av óvanliga nógvum regni í hesum døgum. Í Milano í Italia og á Barcelona-leiðini í Spania stóðu fleiri gøtur undir í vatni í gjár.

# Einki brek við flogfarinum

**Airbus hevur kannað upplýsingarnar um flogfarið, sum datt niður í Brasil 17. juli, men har var einki brek at finna**

Tá tann brasilski flogskiparin skilti, at hann fekk ikki sett flogfarið á Congonhas-flogvøllin, koyrdi hann ferð á motorarnar fyri at sleppa uppaftur. Tað eydnaðist flogfarinum at sleppa tvørtur um ein motorveg, sum er við flogvøllin, men so datt tað niður á eina bensinstøð, og so stóð alt í ljósum loga. Tá uppruddingararbeiðið var liðugt, høvdu 199 fólk latið lív, teirra millum øll tey 187, sum vóru í flogfarinum.

Síðani vanlukkuna hevur verið gitt, um nakað bagdi flogfarinum, men ein talsmaður fyri Airbus-verksmiðjuna segði í gjár, at felagið hevur ikki funnið nakað brek við flogfarinum út frá teimum upplýsingum, sum eru tøkar.

- Tað er einki, sum bendir á, at nakað brek var við flogfarinum, segði talsmaðurin í einari hoyring hjá niðurlendska tjóðartinginum.

Brasilska flogskiparafelagið hevur givið Congonhas-flogvøllinum skyldina av vanlukkuni. Felagið sigur, at vøllurin er alt ov stuttur og sera vandamikil, tá tað regnar. Tað gjørdi tað tann 17. juli.



*Alt koladist upp, tá eldur kom í brasilska flogfarið*

## STUTT SAGT

### Prestur rann nakin

Ein katólskur prestur í amerikanska statinum Colorado kann vænta sær harða revsing, eftir at tað er komið fram, at hann rann nakin á einum skúlaøki nú ein dagin. Maðurin hevur greitt løgregluni frá, at hann dugir væl at síggja, at tað var skeivt at renna nakin, men hann umbar seg við, at hann sveittar sera illa, tá hann er úti og rennur. Tí helt hann, at hann kundi lata seg úr. Erkabiskupurin í Denver sigur, at málið er sera álvarssamt, men at erkabiskupurin bíðar eftir, hvat løgreglan ger við málið.

### 700 gorillur eftir

Djóraverndarfelagsskapir í Afrika hava funnið fýra deyðar fjallagorillur í einum friðaðum náttúruverndarøki í Demokratiska Lýðveldinum Kongo. Tað vísti seg, at gorillurnar vóru skotnar. Djóraverdnarfelagsskapirnir siga, at nú eru einans 720 fjallagorillur eftir í heiminum, 380 í Demokratiska Lýðveldinum Kongo og 340 í einum friðaðum øki í Uganda. Men hóast gorillurnar eru friðaðar, verða fleiri skotnar til matna.

### Sami áhugi

Stuttleikafiskimenn, sum á hvørjum ári leita sær til Íslands at fiska laks og síl í teimum nógvu áunum har, hava ikki fingið so nógv burturúr í summar, og tí stúrdu summi fyri, at áhugin fór at verða minni næsta summar. Men so er ikki. Morgunblaðið skrivar, at eftirspurningurin eftir teimum bestu fiskiplássunum næsta summar er líka stórur sum í ár.